# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Hóskvøldið 30. okt.**
***Sambýlið á Heygnum:*** kl. 19.30, Elsa Funding

**Kirkjan í Mikladali**
Møti verður fríggjakvøldið kl. 20 og leygarkvøldið (Alla halgannakvøld) kl. 18 v. John Myllhamar, trúboðara.

**Alla halganna dag**
***Havnar kirkja:*** kl. 20 Jógvan Fríðriksson, biskupur
***Minningarhald teirra sjólátnu verður við minnisvarðan í Miðvági*** alla halganna dag (1. nov.) kl. 15. Ann Dahl Hansen, prestur talar. Sálmabókin verður nýtt. Um ikki viðrar verður minningarhaldið í kirkjuni.
***Gjógv:*** kl. 14 minningargudstænasta Emil Olsen.
***Eiði:*** kl. 15.30 minningargudstænasta Emil Olsen
***Haldarsvík:*** kl. 15 mindegudstjeneste - Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 20 Bergur D Joensen
***Vágur:*** kl. 15 Minningargudstænasta, Patrick de Neergaard
***Tvøroyrar kirkja:*** Minningarhald verður kl. 13.30. Aftaná verður farið út á minnisvarðan, har kransar verða lagdir.

**Alla halganna sunnudag 2. november**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Ann D. Hansen, ***talvan gongur fyri Einkjugrunnin.***
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Jógvan Fríðriksson, biskupur. T***alvan gongur fyri Einkjugrunnin.***
***Vestmanna kirkja:*** kl. 11, deyvagudstænasta við Jónsvein Bech, altargongd, ***talvan gongur fyri deyvameinigheitina.***
***Sandavágur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen. ***Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Einkjugrunnin.***
***Sørvágur:*** kl. 12, Inga Poulsen Dam
***Kvívík:*** kl. 12, Theodor E. D. Olsen. ***Talvan gongur í Norðstreymoyar prestagjaldi fyri Einkjugrunnin***
***Norðskála:*** kl. 12 messa (minningarhald) Emil Olsen.
***Funningur:*** kl. 17 messa (minningarhald) Emil Olsen.
***Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Einkjugrunnin***
***Gøta kl. 12:*** Martin R. Jacobsen - ***í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin***
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12 við konfirmantaltargangi v/ Henning Bøgesvang
***Leirvík:*** kl. 12, Uni Næs
***Hellurnar:*** kl. 17, Uni Næs
***Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Einkjugrunnin***
***Christianskirkjan:*** kl. 11 Niels Pauli Danielsen ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Húsar:*** kl. 12 Hanus Simonsen altarg. ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Mikladalur:*** John Myllhamar
***Dalur:*** kl. 12 Jákup R. Hansen
***Svínoy:*** kl. 12, altarg., Elsa Funding
***Tvøroyri:*** kl. 11 Símun Jacobsen. ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Hvalba:*** kl. 12.30 Símun Jacobsen. ***Talvan gongur fyri einkjugrunnin***
***Porkeri:*** kl. 12 + altarg.,
***Vágur:*** kl. 18 Alla halganna konsert gudstænasta, Patrick de Neergaard

**Minnisvarðin í Kollafirði**
Allahalganadag verður minnisvarðin í Kollafirði avdúkaður kl. 14.00
Kollfirðingar hava í rúma tíð arbeitt við at reisa minnisvarða yvir teir, ið eru farnir á sjónum og tey, ið eru farin á landi av vanlukkuáum. Minnisvarðin stendur í tí vakra og sjáldsama lendinum í Beitinum við Sjógv í Kollafirði.

**Minningarhald teirra sjólátnu**
verður við minnisvarðan í Porkeri 1. nov. kl. 15.00. Jastrid Sørensen talar og kransur verður lagdur.

**Lívdin**
Mammubólkurin samlast **á Brekku** fríggjamorgunin kl. 10.30. Allar mammur at smáum børnum vælkomnar.
**í Hoyvíkar skúla**
fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti - Preben Hansen talar.
Leygarmorgunin kl. 10 samlast kvinnubønarbólkurin hjá Jastrup Clementsen Marinargøta 7b.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har evnið verður »Tankar úr Ápostlasøguni« Petur Hansen talar.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Á tilbiðjunarmøtinum er evnið »Maðurin, áðrenn hann fer á ferð« Poul Guttesen talar.
Kl. 12 Sunnudagsskúli
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo
Leita á okkara heimasíðu, har ber til at hoyra nógvar sangir og talir.

**KFUM og K, Tórshavn**
***Mikudagur 29. oktober***
kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
***Hósdagur 30. oktober***
kl. 19.30 í KFUK: Fundur við Ingu Poulsen Dam Evni: Tíðin.
***Mánadagur 3. november***
kl. 15.00 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Jógvani Fríðriksyni. Evni: Lívsvirðir.
***Týsdagur 4. november***
kl 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.
***Týsdagur 4. november***
kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur.
***Mikudagur 5. november***
kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.

**Adventkirkjan**
Mikukvøldið kl. 19.30 fyrilestur v/ Jens V. Danielsen um brævið til samkomuna í Týatira.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hóskvøldið kl. 20 kvinnumøti.
Fríggjakvøldið kl. 19 After Eight, kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/Jóna Johannesen kl. 12 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Frá Missiónshúsinum við Landavegin**
Hóskvøldið møti kl. 20.00
Sunnukvøldið møti kl. 19.00

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagin kl. 20 Bíbliutími við Sólrun Poulsen, mos 9.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti við Boga Olsen
Sunnudagin kl. 18 Møti við Tom Skaale. Evnið: Trýeinigheitin.
Innsavning.

**Fra Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøld kl. 20 venur felagskórið.
Hósdagur kl. 16 venur gentukórið.
Hóskvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Hera Joensen - evni Deyðin.
Sunnudagur kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Alfred Petersen.
Sangur - Menn syngja allahalganar sangir. Innsavnan til húsið.
10. nov. kl 19.30 kemur Steen Palmquist at hava evniskvøld í Meinigheitshúsinum í Havn evni er: Sæddur – Hoyrdur og góðkendur.
Tiltakið er ókeypis, men høvi verður at geva Agabe eina gávu.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Mikudagin kl. 17.15 barnakórið.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 19.30 ungdómsmøti.
http://www.gospel.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin Umlættingarheimið kl. 19.
Cellugruppur fyri menn verður hjá Regin Haraldsen kl. 19.
Tórsdagin: Árasøla kl. 19.
Sunnudagin: Halgunarmøti kl. 11. Sunnudagsskúli kl. 14.
Bønarløta kl. 17.30, Møti kl. 18 v/ Majorinum Hildegar Ørsnes og Tórgeir Nybo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli, kl. 20 Chill.
Leygardagin kl. 21 Flare-extended
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti – Tummas Jacobsen talar. kl. 11.30 Sunnudagsskúli.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími og bønarløta
Sunnudag 2. november kl. 10.30 Morgunmøti og barnaansing
Kl. 11.30 Samvera við drekka
Kl. 12 Familjumøti. Evni: Jónas. Símun Absalonsen talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 1.11.2008 kl. 19. Talari: Hallur Sørensen.

**Filadelfia Vágar**
Mikukvøld kl. 20: bønarmøti
Sunnudagin einki møti ella sunnudagsskúli. Víst verður til vikuskiftismøtini í bygdaskúlanum í Miðvági.

**missiónsvika**
verður í Bø, dagarnar 6.-9. nov.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Hósdagin 30/10 Barnaarbeiði í Saron, klokkan 18.30
Sunnudagin 2/11 - Morgunmøti við breyðbróting, kl. 11.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta verður hóskvøldið kl. 19.30.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14 og møti kl. 18.
Húsmøti verður hjá Hansinu og Magnus Paula mánakvøldið kl. 19.30
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Saron Haldórsvík**
Fríggjadagin 31/10 húsmøti hjá Henny Vík, kl. 20. Ver hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvikan í Haldórsvík**
verður frá 6.-9. november.

**Karmel, Eiði**
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Atla Rasmussen.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Lovsongsmøti við luttøku frá Getsemane.
Leygadagin kl. 17 Tim 5.
***Evangelisk møtir verða í Lívsins Orð, Saltangará undir heitinum »Ein nýggj byrjan«***
Leygakvøldið kl. 20
Sunnukvøldið kl. 17
Við talu sangi og vitnisburði.
Biðið verður fyri sjúkum og øðrum tørvum.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 20 Bíbiltími - Ísrael og endatíðirnar v/ Andreas Andreassen.
Fríggjadagin kl. 21 Ungdómsmøti - Asiatoymi.
Sunnudagin kl. 17 Sunnudagsskúli,
kl. 17 Møti: Tórfríur og Olga Magnussen, Lamba tala, Streingjakórið syngur.
Innsamling til arbeiði í húsinum. Drekka aftaná møti.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Anniku Høj.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Hjørdis H. Petersen.
Barnamøti kl. 17. Aftaná verður náttúrði.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Sunnukvøldið 2. nov. 2008 kl. 18 verður møti í missiónshúsinum við Henry Jarnskor, Sylverius Jacobsen og Petur Nolsøe, Thabor kórið syngur. Evnið Lukas 24, 50-53.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Jens Bech talar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími við Niels Jákup Nielsen Jósvabók kap. 9
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Ungdómsalpha
Hóskvøldið kl. 2 ungdómsmøti v/ Rúna Rasmussen.
Sunnukvøldið kl. 18 Sunnudagsskúli og møti v/ Hjalgrím Davidsen.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti
Onki ungdómsmøti er fríggjakvøldið.
Hvønn gerandismorgun kl. 6:15 er morgunbøn.

**Árnafjarðar kirkja**
Fríggjakvøldið 31. okt. kl. 19.30 møti við Petur Martin Glerfoss, streingjakórið í KFUM & K í Klaksvík syngur.
Leygarkvøldið 1. nov. kl. 19.30 møti við Pól Jóhannessen og Jakup Petersen.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Matt. 7. kap.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli.
Kl. 17.30 bøn- & lovsangur.
Kl. 18 møti. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri:**
Sunnudagin er sunnudagsskúli kl. 14. Møti kl.18 við Símun Jacobsen, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikudagin kl. 20 fundur um streingjakórið.
Fríggjadagin kl 9.30 Orðið á borðið, kl. 21 sangcafe, felagssangur við meira.
Leydardagin kl. 20 vit halda áfram við evang sang og vitnimøti.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli, kl. 18 møti við luttøku av Jacobinu og Finnboga.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf: 316491/286491*
*Fax 316481 · Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
***<u>Hósdagur</u>***
kl. 10.00 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin hittist aftur 30. okt.
11-16.30 Vitjan av sandoyingum
12.00 Fiskasuppa frá Oddvør Skarðhamar. Tilm. 316491
Steypakapping í boccia: Sandur - Tilhaldið
***<u>Fríggjadagur</u>***
10 - 13.30 Matgerð - Anne Grethe Harlou
10-17 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
***Týsdag:*** Fimleikur.
***Mikudag:*** Ítriv.
***Hósdag:*** Teldukunning.
Opið er kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi Glyvrar**
Tlf. 448279
Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00.
Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.
***<u>Skrá vika 44</u>***
***Hósdagur 30. okt.:***
Felagssangur
***Fríggjadagur 31. okt.:***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
Opið er mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.
***Hósdagin 30. okt. kl. 14.30*** hugleiðir Egon Hansen um Fýrin á Borðuni og fólkið har.

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
Vit hava opið týsdag, mikudag og hósdag kl. 15-18 í Luffustovu.

**Tilhaldið Hugnin**
Tilhaldið Hugnin í Sandoy hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Hósdagin 30. okt.***
fara vit til Havnar at boccia ímóti teimum í Havn. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 9.45 og úr Skopun kl. 10.30. Kostnaður 150 kr. fyri hvønn. Neyðugt er við tilmelding.

**Dagtilhaldið Vesturskin Toftir**
Opið týsdag, mikudag og hósdag frá kl 15-18. Øll eldri eru vælkomin.